## Ver við í lutakastinum, har seks vinnarar fáa eitt listafólk á skúlavitjan.

Talan er um eina skúlavitjan til ein skúlaflokk (ella 24 næmingar) í ein tíma. Vinnarin og listafólkið gera í felag av, hvat tímin skal innihalda, og nær hetta skal vera (í skúlaárinum 21/22). Trektir verða seks vinnarar, ið hvør vinnur eina skúlavitjan. Tey seks listafólkini/forlag umboða tær seks listagreinarnar, ið Fjølrit umboðar.

---

### Bókaforlag - Fannir





Marianna Debes og Árni Dahl stovnaðu forlagið FANNIR í 1978. Forlagið hevur tilsamans givið út um 150 bøkur.
Vanliga koma 4-5 bøkur út árliga. Forlagið hevur givið út nógv yrkingasøvn. Millum yrkjararnar eru Steinbjørn B. Jacobsen, Jóanis Nielsen, Tóroddur Poulsen, Astrid Joensen, Oddfríður Marni Rasmussen, Petur Pólsson og Sigri Gaini. Forlagið hevur eisini givið út skaldsøgur, barna- og ungdómsbøkur, søgusøvn, leikritarøð í 31 bindum, teknisøgur og týddar heimsbókmentir sum t.d. finska tjóðkvæðið “KALEVALA” og “DEKAMERON”.

---

### Miðlafólk - Jón Brian Hvidtfeldt



Jón Brian er útbúgvin journalistur frá Danmarks Journalisthøjskole í 2004. Hann hevur síðani lokna útbúgving arbeitt í føroysku fjølmiðlunum, bæði sum journalistur og í fleiri umførum sum tíðindaleiðari. Jón Brian arbeiðir í dag sum journalistur á Aktueltdeildini í Kringvarpinum, har hann eisini er redaktørur á Degi & Viku, útvarpstíðindunum og á aktualitetssendingini Breddin. Jón Brian hevur síðstu árini verið formaður í felagnum Føroysk Miðlafólk.

---

### Myndlistafólk - Rannvá Holm Mortensen



Rannvá hevur verið virkin innan føroyska málningalist og grafikk tey seinastu 20 árini og hevur sýnt fram ymsa staðni í Føroyum, í Danmark, Íslandi, Onglandi, Fraklandi, Spania og Bulgaria

Í 2018 fekk hon Mentanarvirðislønina M. A. Jacobsens fyri fagrar bókmentir fyri langyrkingabókina ’Sólsmakkur’, sum er ein long yrking.

---

### Rithøvundur - Rakel Helmsdal



Rakel hevur skrivað barna– og ungdómsskaldsøgur, stuttsøgur til vaksin, ævintýr, sjónleikir, myndabøkur o.a

Síðani 1996 hevur Rakel havt skriviskeið, á kvøldskúla, úti á skúlum og nú á Listaskúla Føroya.
í 2016 fekk Rakel Barna- og ungdómsheiðursløn Útnorðurráðsins fyri *Hon, sum róði eftir ælaboganum* og í 2017 fekk hon Barna- og ungdómsvirðisløn Íslands fyri *Neyðars skrímsl*.

## Tónaskald - Magnus Johannessen

Magnus hevur altíð fingist við tónleik og heilt tíðliga byrjaði hann at skriva egið tilfar. Sum tónaskald er hann rættiliga fjølbroyttur. Hann hevur skrivað tónleik bæði til útgávur, til sjónleik og film/sjónvarp. Tónleikurin er skrivaður til alt frá solo obo til symfoniorkestur og big band. Stílurin spennir tískil eisini víða - frá klassiskt til fólkatónleik, rock og jazz.



## Yrkisfotografur - Sunrid í Gong

Sunrid bleiv útbúgvin fotografur í 2008. Hon hevur atelier á Saltangará og er eisini partur av Fotostudio í Havn. Hon fotograferar so gott sum alt, børn, brúðarpør, familjur, konfirmantar o.s.fr.

